Formaðurin sleppur ikki at forða okkum

Limir í Felagnum Nótaskipum eru misnøgdir við, at formaður teirra, Atli Hansen, mælir til at til at bremsa útbyggingini av svartkjaftavinnuni

ÁKI BERTHOLDSEN

–Er Atli Hansen farin at brúka sítt starv sum formaður í Felagnum Nótaskipum til at forða nøkrum av teimum, sum eiga nótaskip, til at byggja út, samstundis, sum aðrir jást hava bygt út?

Hetta er ein spurningur, sum limir í Felagnum Nótaskipum, nú seta sær sjálvum.

Í øllum førum er tað greitt, at onkrir limir í Felagnum Nótaskipum eru ikki so fegnir um, at formaðurin í felagnum skrivar grein eftir grein í bløðunum um at tað er neyðugt at tálma útbyggingini av svartkjaftavinnuni.

Ein av teimum nótareiðarum, sum bara hevur eitt gamalt og lítið nótaskip, er Jákup Olsen í Vági, og vit hava spurt hann, um hann er samdur við formannin hjá sær, at vit nú eiga at tálma útbyggingini av nótaflotanum.

Tað er hann ikki.

Og hann er eisini misnøgdir við, at Atli Hansen brúkar sítt starv, sum formaður í felagnum Nótaskipum til at heita á landsins myndugleikar um at steðga útbyggingini av nótaflotanum.

– Tað eru átta limir í felagnum Nótaskipum og eg kann ikki hugsa mær, at eg eri tann einasti, sum ikki taki undir við formanninum, sigur Jákup Olsen.

Jákup Olsen sigur annars, at málið er ikki viðgjørt í felagnum og tí dugir hann ikki at sígga, hvussu Atli Hansen kann úttala seg fyri Felagið Nótaskip.

Reiðarin í Vági ivast eisini í, um tað tænir áhugamálunum hjá Nótaskipum, at formaðurin áhaldandi fins at og hartar landsstýrismannin í fiskivinnumálum.

Helst hevði tað tænt okkum betri at samstarva við hann og at víst á gongar leiðir, heldur enn at gera hann til ein mótpart hjá felagnum.

Atli ger mismun

Jákup Olsen sigur, at eitt er, at Atli Hansen ger seg til talsmann fyri, at nýggj loyvi ikki verða.

– Men hann kann ikki gera seg til talsmann fyri, at vit, sum eru í vinnuni, ikki skulu sleppa at byggja út.

Hann vísir á, at tað sær eitt sindur merkiligt út, at beint táið nakrir nótabátar eru skiftir út við størri og betri skip, skal Atli Hansen gera seg til talsman fyri at leggja lok á.

– Hvat so við okkum, sum eiga Saksaberg? Og hvat við øðrum bátum bátum, sum eisini eru lítlir og ótíðarhóskandi? Skulu vit ikki sleppa at skifta skipini út við størri og betri skip spyr Jákup Olsen.

Vit mugu koyra á

Jákup Olsen heldur tvørturímóti, at tað hevur alstóran týdning, at føroyingar koyra á at fiska svartkjaft.

– Vit hava ikki havt skip til at fiska nakað serligt av svartkjafti. Tí hevur tað eisini verið trupult at kravt nakað serligt av kvotu.

– Og leggja vit ikki doyðin á at fiska meiri svartkjaft, verður tað eisini trupult í framtíðini at krevja nakað serligt av kvotu.

Og nettupp tí leggur Jákup Olsen dent á, hvussu stóran týdning tað hevur hjá føroyingum at fiska meiri svartkjaft.

Saksaberg er eitt av teimum nótaskipunum, sum treingir til at verða skift út. Men reiðarin, Jákup Olsen, heldur, at áskoðanin hjá formanninum í felagnum nótaskipum, er ein forðing fyri hesum og tað góðtekur hann ikki

Samstundis sær hann svartkjaftin sum ein av teimum heilt fáu møguleikunum, vit hava, til at menna fiskivinnuna, tí toskurin, hýsan, upsi og onnur fiskasløg, eru so hart troytt, at har eru neyvan møguleikar at fáa meiri burturúr. í hvussu so er til nøgd.

– Svartkjafturin er einasti fiskurin, vit eiga eftir og tað ber ikki til at lata hann gleppa okkum av hondum.

Tvørturímóti eiga vit at fiska sum mest fyri at styrkja okkara støðu.

Íslendingar og norðmenn skulu parkerast

Reiðarin á Vági ásannar kortini, at tað kann koma at sansa at hjá summum bátum, um kvotan, vit fáa, ikki verður nóg stór.

– Men so er bara eitt at gera. Og tað er at fáa svartkjaftakvotuna hækkaða.

Sostatt heldur Jákup Olsen, at tað er ógvuliga umráðandi hjá føroyingum at leggja á annan bógv og at krevja eina hægri kvotu.

–Tað hevur stóran týdning, at vit ikki góðtaka, at fáa eina so lítla svartkjaftakvotu, at tað ikki verður nóg mikið til eina veruliga, føroyska vinnu.

Hann sigur, at fyri at fáa eina hægri kvotu, er tað neyðugt, at føroyingar parkera íslendingar og norðmenn úti á síðulinjuni í eina tíð og fara at samráðast við ES ístaðin um svartkfatin.

–Íslendingar og norðmenn hava nýliga samráðst aftanfyri ryggin á føroyingum um toskin í Smoguhavinum, og tað fekk avleiðingar fyri føroyingar, tí tá góvu norðmenn íslendingum burturav toski, sum vit eiga sáttmálarætt til.

– Tí er tað onki forgjørt í, um vit parkera teir á síðulinjuni í hesum málinum, tí teir hava gjørt tað sama ímóti føroyingum.

Jákup Olsen sigur, at tað sindri av svartkjafti, sum er í norskum og íslendskum sjógvi er so lítið, at tað er onki at tosa um.

– Allur svartkjafturin av týdningi er í ES og føroyskum sjógvi. Tað eru ES og vit, sum eiga svartkjaftin.

– Sostatt eru tað vit og ES, sum eiga at samráðast um svartkjaftin. Og tí eiga vit at taka fyrstu violinina frá íslendingum og norðmenn í hesum máli og venda okkum til ES at samráðast um at býta svartkjaftin.

Higartil hava vit mest brúkt svarkjaftin til at býta um við botnfiskakvotur aðrastaðni.

Men tann møguleikan heldur Jákup Olsen, at vit kunnu varðveita.

– Tað veldst aftur um, hvussu stóra kvotu, vit fáa í okkara part, sigur hann.

Grundarlagið fyri uppsagnunum burtur

Á einum fjølmentum aðalfundi í dag samtyktu fundarfólki eina yvirlýsing, sum staðfestir, at málið á Innkrevjingardeildini hjá Toll- og Skattstovu Føroya ikki er av fyrrenn ØLL 14 fólkini, hava fingið høvi til at koma aftur til arbeiðis, og at tey øll 14 fáa eins viðgerð framyvir.

Aðalfundurin álegði nevndini at virka fyri, at hesi viðurskifti koma í rættlag. 7 av fólkunum, sum hava starvast á Innkrevjingardeildini, hava sagt seg úr starvi orsakað av samstarvstrupulleikum við leiðsluna á Innkrevjingardeildini.

Nú leiðarin ikki longur er í starvi á Innkrevjingardeildini, er grundarlagið fyri uppsøgnunum burtur. Við tað at Fíggjarmálastýrið hevur sett nýggja leiðslu á

Gunnleivur Dalsgarð á aðalfundinum leygardagin

Innkrevjingardeildini viðurkennir hon, at hon hevur haft leiðslutrupulleikar, og má tí fara undir at viðgera støðuna saman við øllum 14 starvsfólkunum av nýggjum.

Semjan sum Starvsmannafelagið gjørdi við fíggjarmálaráðharran, Karsten Hansen, innibar eisini eina avtalu um at fólkini skuldu viðgerast eins, og at øll skuldu vera umfatað av arbeiðnum av desentraliseringini.

Á aðalfundinum vórðu viðgjørd fleiri onnur mál m.a. brotini á grein 2 í sáttmálanum, broyttur bygnaður og komandi sáttmálasamráðingar, sum longu nú er neyðugt at fara í holt við at fyrireika.

Eisini var formans- og nevndarval. Gunnleivur Dalsgarð stóð fyri valið sum formaður og hann var einmælt aftur valdur sum formaður fyri eitt tvey ára skeið. Heini Joensen og Ingun Olsen stóðu eisini fyri fyri vali, og tey vóru aftur valdi. Sum eyka limir vóru Súni Selfoss og Janus Djurhuus aftur valdir.

Starvsmannafelagið

Tórshavn tann 26.02.2000

Yvirlýsing

Frá aðalfundi Starvsmannafelagsins

Aðalfundurin, sum er hægsti myndugleiki Starvsmannafelagsins staðfestir, at málið á Innkrevjingardeildini á Toll- og Skattstovu Føroya ikki er av fyrrenn øll 14 starvsfólkini hava fingið høvi til at koma at aftur í arbeiðið.

Aðalfundurin álegguur nevndini í Starvsmannafelagnum at virka fyri hesum.

Samtykt á 39. aðalfundi hjá Starvsmannafelagnum tann 26. febr. 2000

Bæði tól og peningur manglar innan alt sjúkrahúsverkið

Eg eri ikki samd við Jógvan við Keldu í, at trupulleikarnir bara vaksa í sjúkrahúsverkinum, sigur Helena Dam á Neystabø millum annað í svari upp á fyrispurning

ÓLAVUR Í BEITI

Hvussu ber tað til, at meðan Almanna- og Heilsumálastýrið bólgnar av fólki so bara vaksa trupulleikarnir í sjálvum verkinum? vildi Jógvan við Keldu hava at vita frá heilsumálaráðharranum, og verður svarað, at tað var úrslitið av bygnaðaruppskotinum hjá Finn Norman Christensen, sum avgjørdi, at umsitingin innan sjúkrahúsverkið, á Almannastovuni, hjá Sjúkrahússtjóranum og táverandi Almanna- og heilsudeildini í Tinganesi skuldi øll leggjast saman til eitt stýri. Tað er nú gjørt. Talan er ikki um fleiri fólk, men um tey somu fólkini, sum nú eru sett eitt stað.

Í øðrum spurningi vildi spyrjarin hava at vita, hví sjúkrahúsleiðarin á Landssjúkrahúsinum ger tað trupult hjá yvirlæknum at ferðast millum sjúrkahúsini, og svarar heilsumálaráðharrin, at á Klaksvíkar Sjúkrahúsi er eingin kirurgiskur yvirlækni settur. Tað er av vælvild, at sjúkrahúsleiðslan á Landssjúkrahúsinum hevur skipað so fyri, at tað framhaldandi er kirurgisk vakt á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, tí tað eru læknarnir á Landssjúkrahúsinum, sum reka vaktina á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Um so var, at læknarnir á Landssjúkrahúsinum ikki røktu læknauppgávur í Klaksvík, so hevði eingin kirurgi verið á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Nevnd sett

Og hví Almanna- og Heilsumálastýrið ikki vil seta kirurg á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, hóast umsøkjari er, svarar Helena Dam á Neystabø, at Almanna- og heilsumálastýrið leggur seg ikki út í setan av skurðlæknum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Tað er Klaksvíkar Sjúkrahús, sum sjálvt setir skurðlæknar. Bert tá talan er um yvirlæknar, eisini um yvirlæknar í kirurgi,ið verða settir sum tænastumenn, er tað landsstýrismaðurin, sum setur og ikki Klaksvíkar Sjúkrahús.

Viðvíkjandi spurninginum, hví Landssjúkrahúsið altíð fær so nógv meiri enn Suðuroyar- og Klaksvíkar sjúkrahúsi, sigur heilsumálaráðharrin seg hava mælt til, at serstøk tólakonto verður stovnsett til øll 3 sjúkrahúsini, við tí endamáli at samskipa neyðugar íløgur av hesum slagi. Eg vil fegin enn einaferð fegnast um, at Løgtingið gjørdi av at játta pening til hesa konto fyri øll 3 sjúkrahúsini á fíggjarlógini í ár. Henda konto fer at verða umsitin av einari nevnd við fólki frá øllum 3 sjúkrahúsunum.

At enda vildi Jógvan við Keldu hava at vita, um allir deildarleiðarar í Almanna- og Heilsumálastýrinum koma av Landssjúkrahúsinum, og svarar heilsumálaráðharrin, at deildarstjórarnir í Almanna- og heilsumálastýrinum eru settir sambært lýsing og millum teir umsøkjarar, sum vóru best kvalifiseraðir.

– Eg skal nýta høvi til at upplýsa, at Almanna- og heilsumálastýrið hevur verið sera heppið at fingið dugnaligar og arbeiðssamar deildarstjórar. At enda kann upplýsast, at tann eini av teimum hevur havt eitt leiðandi starv á Landssjúkrahúsinum, svarar Helena Dam á Neystabø.



Landsstýrismaðurin fegnast um, at løgtingið hevur játtað pengar til eina serliga tólakonto fyri øll trý sjúkrahúsinum í landinum

Bensinavgjaldið eigur at endurskoðast

Byggir avgjaldsskipanin annars á at tryggja landskassanum inntøkur og at tálma orkunýtsluni, so er endamálið fokið, nú vaksandi tal av privatbilum nýta diesel sum brennievni, sigur Bjarni Djurholm í viðmerkingunum til fyrispurning

ÓLAVUR Í BEITI

Í farnu viku fekk Karsten Hansen fyrispurning frá Bjarna Djurholm, sum vil hava at vita frá fíggjarmálaráðharranum, hvør fakturaprísurin á bensini (kalium og blýfrítt, 98 oktan) og á diesel er? Løgtingsmaðurin vil hartil hava at vita, Hvørji avgjøldini á bensini (kalium og blýfrítt, 98 oktan) og á diesel eru, og hvussu verða tey ásett? Og at enda spyr Bjarni Djurholm, um landsstýrismaðurin hevur ætlanir um at lækka/regulera avgjøldini á bensini, so bensinprísurin verður í javnari lutfalli við dieselprísin?

Prísmunurin 4 kr/l

Í viðmerkingunum sigur Bjarni Djurholm m.a., at farnu tíðina eru oljuprísirnir á heimsmarknaðinum støðugt hækkaðir. Hetta hevur m.a. havt við sær, at prísurin fyri blýfría bensinið nú er 8,29 kr/l, meðan kaliumbensinið kostar 8,41 kr/l (pr. 24. februar 2000). Hóast alheims prísvøkstur, so er endaprísurin á bensini og diesel treytaður av vinninginum, sum oljufeløgini taka, og ikki minst avgjøldunum, sum fara í landskassan. Politiski myndugleikin hevur tí stóra ávirkan á endaliga prísin.

– Farna árið er bensinprísurin hækkaður við uml. 1 kr/l, ella um 200 kr/mðr. fyri vanliga koyring. Príshækkanin hevur ikki rakt eigararnar við dieselbilunum líka meint, men eisini her er talan um munandi prísvøkstur (4,33 kr/l pr. 24. februar 2000). Úrslitið av prísgongdinini farna árið er, at prísmunurin millum superdiesel og bensin nú er umleið 4 kr/l.

– Spurningurin er tí, um landsstýrismaðurin ikki eigur at endurskoða avgjaldsskipanina á bensini, so skipanin verður í javnari lutfalli við avgjøldini á diesel, við øðrum orðum at lækka bensinavgjøldini. Fakturaprísurin á olju/bensini verður m.a. reguleraður av altjóða oljuprísinum og dollarkursinum, sum skifta javnan. Hetta skuldi tó ikki forða landsstýrismanninum at fingið til vega prísleguna pr. 24. februar 2000, sigur Bjarni Djurholm m.a. í viðmerkingunum til fyrispurningin.